# Brævið til NATO liður í herferð

*Formaður Javnaðarfloksins heldur brævið til NATO vera liður í eini miðvísari ætlan hjá landsstýrinum at skapa samanbrestir við donsku stjórnina*

JOHN JOHANNESSEN

Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, ivast onga løtu í, at landsstýrið er sera fegið um, at danski uttanríkisráðharrin hevur sýtt landsstýrinum at samráðast við NATO.

– Miðvísa ætlanin hjá landsstýrinum er at skapa samanbrestir við donsku stjórnina, soleiðis at landsstýrið kann vísa føroyingum á, hvussu ómøguligir danir eru. Og hetta er við at eydnast, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaður Javnaðarfloksins vísir á, at brævið til ST um at fáa ein triðja part upp í fullveldissamráðingarnar var ein roynd at skapa samanbrest og brævið til NATO umvegis danska forsætisráðharran var ein onnur roynd.

Tó heldur Jóannes Eidesgaard, at tað hevði verið snildari av landsstýrinum eisini at sent brævið til ST umvegis danska uttanríkisráðharran, soleiðis at hann eisini fekk møguleika at steðga hesum. Hetta, heldur hann, hevði gjørt málið enn ógvusligari og tískil eisini styrkt stiknið, landsstýrið ynskir føroyingar at hava móti donsku stjórnini.

Jóannes Eidesgaard heldur Tjóðveldisflokkin standa aftan fyri hesi gjøgnumhugsaðu ætlan, og heldur hann aðalmálið hjá Tjóðveldisflokkinum vera at forpesta støðuna millum Føroyar og Danmark so mikið, at neyðugt verður at loysa frá Danmark.

### Heimastýrislógin er galdandi

Leiklutin hjá løgmanni í gongdini heldur Jóannes Eidesgaard lítið um. Hann heldur, at løgmaður, við at skriva undir øll hesi brøvini til atjóða stovnar, ber seg at sum forseti fyri fullveldinum Føroyar.

Men formaður Javnaðarfloksins heldur, at løgmaður má gera sær greitt, at heimastýrisskipanin enn er galdandi, og tí má løgmaður halda seg til hana.

– Sjálvur kundi skuldi eg fegin verið við til at vraka heimastýrislógina her og nú, men vit mugu gera okkum greitt, at hon er galdandi, hvat vit so halda um hana, staðfestir Jóannes Eidesgaard.

Vónin hjá formanni Javnaðarfloksins er, at paniklíknadi handlingarnar hjá landsstýrinunm benda á, at tað ber móti endanum á samgonguskeiðnum.

– Eg haldi, at løgmaður má gera sær greitt, at talan verður ikki um fullveldi í hansara skeiði sum løgmaður, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Tjóðveldisflokkurin móti sær sjálvum

Tað undrar Jóannes Eidesgaard, at Tjóðveldisflokkurin, sum í áttatiárunum var ímóti øllum, sum hevði við NATO at gera, nú er so heitur fyri at sleppa upp í NATO.

– Høvdu teir gomlu tjóðveldismenninir vitað, hvussu Tjóðveldisflokkurin nú ber seg at, so ivist eg ikki í, at teir høvdu undrast, sigur Jóannes Eidesgaard.

Men brævið til NATO, er Jóannes Eidesgaard sannførdur um, var ætlað at verða vrakað. Tí heldur hann., at Høgni Hoydal helst hevur jublað og skálað við sjampanju, tá svarið kom frá Niels Helveg Petersen.



# Sýtir løgmanni at tosa við NATO

*Danski uttanríkisráðharrin sýtir fyri at senda viðari eina umbøn frá løgmanni um at sleppa á tal við NATO aðalskrivaran um møguleikan fyri, at Føroyar gerast limir í Partnership for Peace*

JOHN JOHANNESSEN

Løgmaður ynskir at sleppa at tosa við NATO aðalskrivaran um møguleikan fyri, at Føroyar sum fullveldi gerast limir í NATO verjusamstarvinum, Partnership for Peace.

Heimastýrisskipanin krevur tó, at samskifti landsstýrisins á uttanríkispolitiska økinum skal fara umvegis danska uttanríkisráðharran.

Tí sendi Anfinn Kallsberg 25. august umbønina til Lord Robertson, NATO aðalskrivara, um fund umvegis danska uttanríkisráðharran, Niels Helveg Petersen.

Men Niels Helveg Petersen heldur tað ikki vera neyðugt hjá landsstýrinum at fara í beinleiðis samráðingar við NATO um verjusamstarv. Tí vil hann ikki senda brævið víðari til Lord Robertson, NATO aðalskrivara. Hetta ger hann løgmanni greitt í brævi dagfest 30. august.

### Skuldu hittast í Reykjavík

Løgmaður er í løtuni staddur í Reykjavík á ráðstevnu um framtíðar trygdina í Norðuratlantshavi. Á hesi somu ráðstevnu luttekur Lord Robertson, og skjýtur løgmaður tí í brævinum til Lord Robertson upp, at teir hittast í Reykjavík at umrøða framtíðarsamstarv Føroya við NATO.

Løgmaður vísir í brævinum til Lord Robertson á, at Føroyar og Danmark í løtuni samráðast um at skipa Føroyar sum fullveldi, og at fullveldið Føroyar fer at samstarva við síni grannalond innan trygdar- og verjumál. Í slíkum samstarvi fara Føroyar at gera sítt til at varðveita stabilitet í Norður Atlantshavi.

Løgmaður greiðir eisini frá, at landsstýrið hevur ta fatan, at Føroyar sum fullveldi hava møguleikan at søkja um limaskap í NATO ella í Partnership for Peace samstarvinum, sum er ein partur av NATO.

At enda sigur løgmaður seg síggja fram til at hoyra frá Lord Robertson, um tað ber til at hittast í Reykjavík at umrøða hesar møguleikar.

### Krevur her

Í brævinum frá Niels Helveg Petersen, uttanríkisráðharra, til løgmans vísir Niels Helveg Petersen á, at limaskapur í Partnership for Peace merkir verkligt hernaðarligt samstarv millum ávísa landið og NATO. Samstarvið fevnir millum annað um friðarvarðveitandi átøk.

Tískil merkir hetta, at limalandið má hava vápnaðar styrkir, ið kunnu luttaka í venjingum og uppgávum vísir uttanríkisráðharrin á.

Niels Helveg Petersen vísir á, at Føroyar eru ov veikar at fara inn í slíkt samstarv.

Uttanríkisráðharrin býur sær annars at kunna føroyingar gjøllari um verju- og trygdarpolitisku støðuna í Europa.

Landsstýrið vísir pástandunum hjá danska uttanríkisráðharranum aftur. Tað vísir millum annað á, at Ísland er limur í NATO, hóast tað ikki hevur her.



*Skulu føroyingar verða limir í Partnership for Peace er hugsandi, at hetta verður gerandissjón sambært uttanríkisráðharranum*

# Hava brúk fyri upplýsingum

*Løgmaður dugir ikki at skilja, at danski uttanríkisráðharrin mótarbeiðir landsstýrinum, tá tað roynir at fáa neyðugar upplýsingar til vega*

EYÐUN KLAKSTEIN

Løgmaður er firtin inn á danska uttanríkisráðharran, tí hann sýtir fyri at viðvirka til, at landsstýrið kann hitta aðalskrivaran í NATO.

- Danir áttu at viðvirka til, at vit fingu allar neyðugar upplýsingar viðvíkjandi framtíðarstøðuni hjá Føroyum, heldur enn at mótarbeiða okkum, sigur Anfinn Kallsberg, sum í løtuni er á eini trygdarpolitiskari ráðstevnu í Reykjavík.

- Vit hava brúk fyri upplýsingum fyri at kunna taka støðu til, hvussu okkara framtíðarstøða á verjupolitiska økinum skal vera. Danir hava eisini sjálvir biðið okkum koma við einum uppleggi um verjupolitikkin, eftir at Føroyar hava tikið sjálvstýri, og tí eru tað mótstríðandi upplýsingar, sum vit nú fáa frá donsku stjórnini, tá teir ikki vilja hava okkum at tosa við NATO, sigur løgmaður.

### Ikki samráðingar

Landsstýrið hevur viðgjørt, hvat tað skal gera á verjupolitiska økinum, og tað er komið fram til, at felagsskapurin Partnership for Peace er ein áhugaverdur møguleiki.

- Tí hava vit ynskt ein fund við NATO-aðalskrivaran, fyri at vit kundu finna út av, hvørjar okkara møguleikar eru í Partnership for Peace, men hetta sýtir danski uttanríkisráðharrin fyri. Og tað skilji eg ikki, sigur løgmaður.

- Hetta eru ikki samráðingar við NATO, men eitt stig, sum vit ætlaðu at taka, fyri at fáa fleiri upplýsingar um trygdarpolitikkin.

Anfinn Kallsberg ætlaði eisini at hava ein fund við danska verjumálaráðharran, Hans Hækkerup, men hóast tað var líkt til, at hetta skuldi fara at eydnast, fekk landsstýrið fyri nøkrum døgum síðani boð um, at tað bar ikki tilhjá Hækkerup at hitta landsstýrisumboðini í Reykjavík.

### Kunnu ikki taka støðu

Sambært løgmanni er endamálið hjá landsstýrinum er at syrgja fyri, at Føroyar ikki verður ein trygdarpolitiskur vági, tá Føroyar hava tikið sjálvstýri.

- Tí hava vit brúk fyri at fáa allar neyðugar upplýsingar til vega, aðrenn vit kunnu koma við einum uppleggi um trygdarpolitikkin. Men hvussu kunnu vit taka eina støðu, tá vit ikki sleppa fram at teimum neyðugu upplýsingunum, spyr løgmaður.

Løgmaður ætlar sær ikki at venda sær beinleiðis til NATO, eftir at danski uttanríkisráðharrin hevur sýtt at viðvirka til, at landsstýrið fær ein fund við aðalskrivaran í NATO.



Luksusbilar við smáum prísum...

Júst nú er tann nýggi Nubira Stationcar heimkomin - og teir italsku designararnir hava gjørt tað aftur. Nubira er nú flottari enn nakrantíð.

Útsjóndin er ikki tað einasta góða við Nubira. Bilurin er á tremur av hentari útgerð m.a. sentrallás, servostýring, el-rútar, eldrivin/hitaði síðuspegl, tónaðir rútar og viðlitaðir kúfangarar. Nubira Stationcar hevur harafturat eitt av størstu viðførisrúmum í mun til aðrar bilar í sama flokki (1.840 litrar við niðurløgdum setrum).

Sjálvandi fylgir 3 ára verksmiðjugaranti/100.000 km og 6 ára rustgaranti við Daewoo bilinum.

Komið inn á gólvið hjá Esmari Simonsen á Kambsdali og royn Nubira.

Nubira Stationcar úr bert 168.700 kr. Nubira Sedan úr bert 158.700 kr.

Vælkomin!



Matiz er ein fittur og handligur 5-hurða mini MPV við sentrallás, el-rútar og servostýring.
Úr 99.985,-



Lanos 1,3 ella 1,5.
Rúmligur og fjølbroyttur.
(í klassa við Toyota Corolla).
Úr 119.985,-



DAEWOO GARANTI
3ár ELLA 100.000 KM
6ár MÓTI RUSTI

Nubira Stationcar úr bert
168.700,-
Sum sedan úr 158.700,-

DAEWOO
- ein skilagóð avgerð!

P/f Esmar Simonsen
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29